

# Kynstrið at finna røttu

**At finna júst røttu jólagávuna kann vera ómetaliga torført. Hvat gevur man vinkonuni, sum eigur alt, sum hon vil eiga? Ella vermammuni, sum hevur skáp og skuffur fullar av øllum, sum keypast kann? Her eru nøkur góð ráð…**

Ætlanin við at geva gávur er at gleða hvønnannan.Ofta endar tað tó við, at vit í evstu løtu keypa eitthvørt, sum vit innast inni væl vita, helst ikki fer at geva heilt stóru gleðina.

Og vit munnu somuleiðis øll hava fingið onkra gávu, sum vit als ikki gjørdust glað fyri, og sum antin hevur staðið sum húsaskorð í áravís –ella sum reyk á ruskstøðina, tá ruddað varð eftir jól.

## At fáa hugskot

Hugskotini til góðu jólagávuna koma sjáldan av sær sjálvum, men við eitt sindur av snildni ber til at finna røttu gávuna til ein og hvønn.

Í øllum jólastressinum endar tað ofta við, at vit so glaðbeint fara út í handlarnar at leita eftir røttu gávuni, men tað er ein tungur vegur, sum ofta endar við, at vit bara keypa eitthvørt, »tí so hevur man keypt okkurt«.

Skal góða jólagávan finnast, er ofta betri at seta seg niður og hugsa um gerandisdagin hjá móttakaranum. Heilt frá viðkomandi fer upp um morgunin, og inntil farið verður til songar.

Er nakað, sum hevði lætt um í gerandisdegnum? Er nakað, sum ofta verður brúkt og sum treingir til at skiftast út við nýggjari og snildari modell? Ella er kanska okkurt, sum hevði gjørt gerandisdagin stuttligari ella meiri marglætis?

Um tú kennir viðkomandi nóg væl, er hetta ofta ein góður háttur at koma í tankar um góðar jólagávur.

Eitt annað, tú kanst gera, er at skriva upp ígjøgnum árið, hvat fólk ynskja sær. Um vermamman í apríl ynskir sær eina bók við bindingarmynstrum ella vinkonan á ólavsøku ynskir sær eina stóra dós við sikkurheitsnálum til føroysku klæðini, so skrivað tað upp! Hava tær ikki fingið sær tað, tá stundar ímóti jólum, er tað ein uppløgd jólagáva.

Reaktiónin verður helt víst, at »Hvussu kundi tú vita, at hetta var júst tað, eg ynskti mær?« Ella »Hetta hevur mær manglað í fleiri ár, hvussu visti tú tað?«

Ein annar møguleiki er eisini at biðja fólk sjálvi um at skriva upp á ein lista, so hvørt, sum tey koma fram á ting, sum tey ynskja sær. Men tá hvørvur yvirraskilsi við góðu gávuni.

## Tá á stendur

Seinni árini hevur tað vundið alsamt meiri uppá seg at lata upplivingar sum gávu. So um tú ikki kemur fram á nakra jólagávu, sum kann gera gerandisdagin hjá